mítt arbeiðslív

# Vár hjálpir neyðstøddum um allan heim

**Navn:** Vár í Dali
**Aldur:** 31 ár
**Útbúgving:** Hevur lisið altjóða mentan, mál og menning á Roskilde Universitet
**Starv:** Ráðgevi hjá Reyða Krossi

Hon hevur upplivað meira av heiminum og lívsins skuggasíðu enn tey flestu. Hon vil gera mun og veita hjálp til teirra, ið eru hart rakt av vanlukku, kríggi og vesaldómi. Hon setir einstaka menniskjað og boðið um næstakærleika fram um alt annað, tí grundleggjandi eru øll í sama báti, heldur hon. Vit hava hitt Vár í Dali, sum hevur nógvar royndir sum sjálvboðin hjálpari í fleiri londum og nú starvast sum serligur ráðgevi hjá Reyða Krossi.

EFTIR **JÁKUP BOGA JOENSEN** MYNDIR **RÓSA TOVUDÓTTIR, PRIVATAR OG REYÐI KROSSUR**

Milda lyndið, blíða smílið og vinaliga tónalagið brýtur beinanvegin múrin. Hon hyggur djúpt inn í eyguni og er sjáldsama nærverandi. Tað, hon sær, er menniskjað. Púra uttan fordómar. Eingin døming. Næstakærleikin letur seg ikki avmarka. Hann er bara. Grundleggjandi er eingin munur á ríkum og fátøkum, littum og hvítum, kristnum og muslimum. Og so framvegis. Øll eru menniskju. Tað er sjálv kjarnan í hennara hugsjón og dagliga starvi. Hjálp verður veitt teimum, ið treingja og tørva. Og hon letur gleðiliga burtur av sær sjálvari.

Vár í Dali er 31 ára gomul. Hon er fødd í Havn, men er uppvaksin og hevur búð størsta partin av lívi sínum í Danmark. Mamman er føroysk, og pápin er dani. Sjálv tosar hon danskt, men skilir væl føroyskt og vitjar javnan familju, vinir og kenningar í Føroyum.

Vár starvast hjá Reyða Krossi og hevur upplivað meira av lívinum og lívsins skuggasíðu enn tey flestu. Ikki umvegis myndir í alheims miðlum, men á staðnum, har tað veruliga hendir. Ógvusligar náttúruvanlukkur, ið knúsa og oyða alt livandi eins og materiellar ognir. Kríggj, neyð og vesaldóm. Menniskju, ið svolta og ikki fáa mat í munnin. Sjúku og deyða. Úr londum í Afrika og Ásia til Latínamerika. Og flóttafólkastreymin úr eitt nú Sýria til Evropa. Fólk, ið eru flýggjað undan borgarakríggi, bumbum og harðrendum stýri í heimlandinum.

Vár heldur, at tað er trupult og ógjørligt at taka eina hending fram um aðra, tí allar hava fest seg. Men tað hevur kortini sett djúp spor at síggja, hvussu flóttafólk, sum komin eru til Evropa, eru millum tey fyrstu at veita øðrum, sum eru í neyð og vanda, eina hjálpandi hond.
– Tað er tankavekjandi og undrunarvert, at flóttafólk, ið hava sett egið lív í vanda og mist ein av sínum kæru í kríggi ella á vandafullu ferðini í lítlum báti tvørtur um hav, mangan standa fremst í røðini at veita øðrum hjálp. Hetta eru fólk, sum liva undir stórum sálarligum trýsti, og mat hava tey mangan ikki fingið í fleiri dagar. Kortini tykist orkan og viljin til lívið ótømandi. Hetta er sjáldsom og sterk uppliving, ið veruliga hevur fest seg, tí hon sigur okkurt grundleggjandi um menniskjað og tað góða í menniskjanum. Um ta orku og megi, sum er í menniskjanum at berjast fyri lívinum. At liva heldur enn at doyggja og bjarga øðrum undan neyð, vanda og deyða. Tað setir lívið og virðið á mannalívinum í perspektiv, sigur Vár.
Royndirnar merkja hennara hugburð til lívið og tilveruna. Hon hevur eitt víðskygdari útsýni enn tey flestu. Sjónarringurin røkkur langt út um brimgarðarnar við molan í Havn.
Við borðið í Kaffihúsinum undir Bryggjubakka í Havn reika tankarnir víða. Vár reflekterar. Hon er væl lisin. Hon er útbúgvin á Roskilde Universiteti í altjóða mentan, máli og menning í 2015 og hevur tikið lut í sjálvbodnum hjálpararbeiði úti í heimi. Hon dugir óvanliga væl at seta orð á.

## HJARTAÐ Á RØTTUM STAÐ

Vár í Dali var lítil smágenta, tá fyrstu ábendingarnar um góða hjartalagið og komandi lívsleið hennara lótu seg opinbera.
Hon byrjaði at savna pening saman og skrivaði á bússuna, at peningurin skuldi nýtast til at seta á stovn eitt heim fyri børn, sum mist høvdu bæði foreldrini. Tað var ein optimistiskur, naivur og utopiskur barnadreymur, tí peningaliga munaði inntøkan í bússuni lítið í stóru heildarmyndini. Men dreymar skulu ongantíð undirmetast, og hetta var í roynd og veru fyrsta, um enn lítla fræið, ið sáað varð.
– Eg havi altíð kent á mær ein huga at arbeiða fyri korum teirra, ið eru hart og meint rakt í lívinum. Teimum, sum eru illa stødd, líða neyð og liva undir avbjóðandi korum og umstøðum, sigur Vár.
Hon heldur, at umsorganarkenslan varð kveikt longu í upp-vøkstrinum. Tá hon var barn, búði familjan í einum multi kulturellum bústaðarumráði stutt uttan fyri Keypmannahavn, har ikki allar familjur vóru eins væl fyri. Tað kann hava havt eina ávirkan, heldur Vár.
– Verðin hevur ongantíð verið langt burturi og púra fremmand fyri mær, sigur hon.
Hon heldur, at tað er trupult at seta orð á og lýsa innaru kensluna. Men drívmegin er, at hjálpararbeiðið gevur djúpa meining og innihald í tilveruni, tí tað ger mun.
– Í allari neyðini er tað ein lívsjáttandi kensla, tí tað skapar gott fyri mong menniskju, ið eru hart rakt og hava tørv á hjálp. At kunna veita hjálpina er tí ein góð kensla, sigur Vár.
Fyrstu royndirnar við hjálpararbeiði fekk hon longu í lestrartíðini. Hon hevur eisini tikið lut í sjálvbodnum hjálpararbeiði í Gana og í Kolumbia.
Á sumri í 2015 var hon eygnavitni og stóð andlit til andlits við tilverunnar miskunnarleysa eirindaloysi, tá flóttafólk í hópatali streymaðu um mørkini inn í Evropa, og mammur mistu børn fyri borð á vandamiklu leiðini tvørtur um hav. Vár var tá stødd á griksku oynni Lesvos. Har ætlaði hon sær upprunaliga at vera í tvær vikur, men skjótt gjørdist henni greitt, hvussu álvarsom stødan og neyðin var. Tvær vikur gjørdust tí brátt til hálvtannað ár á Lesvos og ymsastaðni í Grikkalandi, har neyðin var stór og tørvur var á hjálp.
Vár ásannar, at tað rakar ógvuliga hart kensluliga at vera eygnavitni til slíkar ræðuleikar.
– Tað er sterk og hjartanemandi uppliving at síggja grátandi kvinnur og mammur, ið mist hava børn síni. Tað fær allar kenslur fram. Grátin. Ómegdina. Máttloysi. Men eisini aðrar kenslur, ið vekja til lívs tað grundleggjandi góða og vælgerandi í mær. Næstakærleikan og miskunnsemi. Og vónina. Slíkar upplivingar tala beint til umsorganarkensluna - ella til mammukensluna, sum fleiri kenna. Tað er so skjótt frá ræðuleika til identifikatiónina og tankan um, at tað kundu verið tíni og míni nærmastu og børn í neyðstøðu. Tá gerst kenslan so verulig og nærverandi, at vit skilja týdningin og dýpdina. Ein veruleiki, sum vit vóna ongantíð fer at henda okkara nærmastu. Men hann er alla tíðina rundan um okkum, veruleikin, og tí er tað ein góð kensla at kunna veita hjálp, har á stendur, sigur Vár.

## Í STARV HJÁ REYÐA KROSSI

Umvegis sítt sjálvbodna hjálpararbeiði í fleiri londum hevur Vár fingið samband við altjóða neyðhjálparfelagsskapin Reyða Kross. Reyði Krossur er heimsins størsti neyðhjálparfelagsskapur við okkurt um 17 milliónum sjálvbodnum, sum virka í 192 londum. Tað ger felagsskapin serligan og unikkan, heldur Vár. Hon gjørdist skjótt partur av arbeiðinum hjá felagsskapinum, og tað var tí ongantíð nakar ivi, tá hon fekk møguleikan at fara í fast starv hjá Reyða Krossi.
Vár er í dag í starvi sum humanur ráðgevi á altjóða tilbúgvingar– og vanlukkudeildini, sum heldur til á skrivstovuni hjá danska Reyða Krossi í Keypmannahavn. Tað er serlig deild, sum veitir hjálp úti í heimi, tá vanlukkur av ymsum slag raka, eitt nú ógvusligar náttúruvanlukkur.
Talan er um eitt serligt ráðgevandi starv, sum danir og føroyingar samstarva og eru felags um. Tað merkir, at Vár ikki einans umboðar danska Reyða Kross, men eisini hevur umboðandi leiklutin og er røddin hjá føroyska Reyða Krossi í millumtjóða samstarvi, tá um vanlukkur ræður.
Vár byrjaði í starvinum í november í fjør og hevur longu havt úr at gera. Hon hevur havt um hendi og samskipað hjálpararbeiði í sambandi við eldgos á Filipsoyggjum, ógvusliga vatnflóð í Indonesia og umfatandi skógareldarnar í Avstralia. Hon hevur eisini verið partur av tilbúgvingini í sambandi við Covid-19, ið hevur rakt stóran part av heiminum.
Uppgávurnar eru tí ógvuliga fjølbroyttar og ymiskar. Og tað dámar henni. Vár stórtrívist í sínum starvi, sigur hon.
– Hetta er mítt dreymastarv. Fyri meg gevur tað djúpa meining at kunna veita góða og skipaða hjálp, har tørvur er á tí, sigur hon.

## UMRÁÐANDI AT KENNA SEG SJÁLVA

Men tað er munur á at sita á fjálgari skrivstovu í Keypmannahavn og vera úti á sjálvari markini í londum, har ógvusligar vanlukkur raka.
Sjálv hevur Vár í fleiri umforum tikið lut í hjálpararbeiði á vanlukkuraktum støðum. Og tað er ikki bara sum at siga tað. Tað er krevjandi avbjóðing, ið setir stór krøv til kropsligu og sálarligu heilsustøðuna, tí alt er øðrvísi. Alt tað, sum mangan verður hildið at vera ein sjálvfylgja, er als ikki nøkur sjálvfylgja í vanlukkuraktum øki. Reint vatn, matur og klæði og heilivágur vantar í nógvastaðni, og streymveitingin er mangan ógvuliga svikalig. Um nøkur streymveiting er yvirhøvur. Tað sama ger seg galdandi, tá um ræður sambandið við umheimin umvegis teldu, internet og fartelefon. Tí er skjótt, at trýstið kann kennast ógvuliga stórt á einstaka hjálparan. Og tí er tað ein greiður fyrimunur, heldur Vár, at hon, sum fegin vil vera partur av altjóða hjálpararbeiði, kennir seg sjálva væl og hevur evnini at reflektera um seg sjálva.
– Hjálparin má fyrst og fremst hjálpa sær sjálvari. Tað er umráðandi at vera væl fyri, merkja eftir og kenna seg sjálva væl og vita, hvar mørkini ganga. Megnar hjálparin ikki trýstið og uppgávuna, kann hon ikki veita neyðugu hjálpina, ið tørvur er á, sigur Vár.
Hóast hjálpararbeiðið gevur djúpa meining, so kann tað seta týðilig spor, tí upplivingarnar kunnu hava sterka kensluliga ávirkan. Tað er í lagi, heldur Vár, men kenslurnar mugu tó ongantíð skugga fyri professionella arbeiðinum og uppgávuni, sum er fyri framman at loysa.
– Sjálvandi ávirkar tað kensluliga. Eg havi sjálv upplivað løtur, har tey raktu doyðu, men kundu verið bjargað, um bara nóg mikið var av heilivági og starvsfólki á sjúkrahúsunum – og neyðugu amboðini vóru tøk og í lagi. Men soleiðis er veruleikin tíverri ikki allastaðni úti í heimi, sigur Vár.
Hon vísir á, at tað er altíð svárt at uppliva, tá menniskju lata lív. Men serliga sterk og viðkvom er upplivingin, tá talan er um grátandi børn, sum líða, og børn, sum doyggja, sigur hon.

## ØLL Í SAMA BÁTI

Vár heldur, at hugburðurin til lívið, tilveruna og onnur menniskju hevur stóran og avgerandi týdning í øllum hjálpararbeiði. Tað er, hvussu hjálparin fer til verka og møtir einum øðrum menniskja sum javnlíki í eygnahædd.
– Tað ræður um at ganga undir liðini á teimum raktu og ikki hevja seg upp um og ganga undan. Tey raktu eru menniskju sum tú og eg. Tey hava somu ynski og dreymar um framtíðina og tað

góða lívið. Munurin er, at lívsumstøðurnar kunnu vera ógvuliga ymiskar. Men annars er eingin munur, tí vit eru øll í sama báti sum menniskju, sigur Vár og leggur dent á, at tað er altíð ein vón fyri framman. Uttan mun til, hvussu døpur og ógjørlig støðan í fyrsta umfari sær út til at vera.
Vár heldur, at hennara hugburður er eisini broyttur munandi hesi árini, hon hevur tikið lut í sjálvbodnum hjálpararbeiði og hevur upplivað heimsins brennideplar, har tað veruliga leikar á.
– Tað er eingin ivi um, at upplivingarnar hava skumpað undir mínar egnu tankar og refleksjónir. Eg hugsi meira enn nakrantíð um, hvat veruliga hevur týdning í lívinum. Um virðini. Um nærveruna og nærsambondini við familju, vinir og kenningar. Tað er tað, sum hevur størsta týdningin og ikki materiellu virðini, sigur Vár.

**ØLL HAVA RÆTT TIL HJÁLP**

Men hví er heimurin so hart raktur av vanlukkum? Og hví er framvegis kríggj, neyð og vesaldómur, tá tað kundi verið øðrvísi? Vár heldur, at spurningurin má býtast í tvey, skulu vit skilja grundleggjandi mekanismurnar.
Annar parturin snýr seg um bardagan móti veðurlagsbroytingum, ið er orsøk til stórar náttúruvanlukkur. Verður einki munagott gjørt til tess at steðga gongdini, kunnu vit vænta enn fleiri náttúruvanlukkur í framtíðini, og tær gerast bara ógvusligari og meira umfatandi og oyðileggjandi við árunum, sigur Vár.
– Hin parturin er grundleggjandi øðrvísi, sigur hon. Meðan stríðið um veðurlagsbroytingarnar mangan er merkt av kjaki um, hvørt broytingarnar eru mannaskaptar ella ikki, er kríggj millum lond og fólkasløg, og ræðuligu avleiðingarnar eru eitt úrslit av mannaskaptum ósemjum og stríði um vald og ríkidømi, ið er ójavnt býtt.
– Kríggj millum lond og fólkasløg snúgva seg grundleggjandi um politikk og politisk viðurskifti og seráhugamál. Tað er ein spurningur um at hava vald. Og ræðisrætt á ráevnum, ið skapa virðini og fíggjarligan og búskaparligan vinning og vøkstur. Oljan í miðeystri er eitt gott dømi um hetta, sigur Vár.
Men spurningurin er, hvussu Reyði Krossur vigar og raðfestir hjálpina.
Vár vísir á, at felagsskapurin hevur greiðar leiðreglur og mannagongdir at halda seg til. Sambært virðisgrundarlagnum er Reyði Krossur óheftur felagsskapur og javnmetir øll menniskju, uttan mun til tjóðskap, húðalit, átrúnað, kyn, seksualitet og so framvegis. Øll menniskju, ið líða neyð, hava rætt til hjálp og stuðul sambært Reyða Krossi.
Men peningurin er avmarkaður, og tí má hjálpin raðfestast. Tað verður eisini gjørt, tí hjálpin hjá Reyða Krossi verður býtt soleiðis, at hon fyrst og fremst kemur teimum, sum hava størsta akutta tørvin á hjálp, til góðar. Mett verður um í hvørjum einstøkum føri, hvør hevur størsta akutta tørvin. Hjálp verður tí veitt eftir tørvi, men málið er púra greitt: Øll hava rætt til og skulu fáa neyðuga hjálp.
Tað er eisini fremsta hjartamálið hjá Vár í Dali.

## Reyði Krossur

Reyði Krossur varð stovnaður í 1863.

Endamálið hjá Reyða Krossi er at verja lív og heilsu og virka fyri virðing, semju, vinalagi, samstarvi og varandi friði millum øll fólkasløg.

Reyði Krossur er heimsins størsti humaniteri hjálparfelagsskapur. Okkurt um 17 milliónir sjálvboðin virka fyri felagsskapin í 192 londum.

Reyði Krossur í Føroyum varð stovnaður 2. apríl í 1926 og er eitt sjálvstøðugt felag. Formaður í nevndini er Jóannes Eidesgaard, og dagligur leiðari á skrivstovuni er Bárður Atlason Ísheim.

Heimildin undir virkseminum hjá Reyða Krossi Føroyar í altjóða samstarvi er grundað í Genevesáttmálanum frá 1949. Reyði Krossur í Føroyum er í altjóða høpi partur av og samstarvar tætt við Reyða Kross í Danmark.